Hvítabók komin og hvat so ...

Ein vika er nú gingin síðani Hvítabók varð almannakunngjørd. Við henni eru nógvir spurningar svaraðir, meðan aðrir spurningar ikki hava fingið nøktandi svar. Sosialurin gevur nú lesarum sínum møguleikan at seta politikarum og serkønum spurningar, sum lesarin heldur áttu at verið við í Hvítubók

SVEINUR TRÓNDARSON
OG HØGNI MOHR

Fyri einari viku síðani kom Hvítabók, sum samgongan hevur latið gera »á marknaðin«.

Trý eru bindini. Eitt høvuðsbind, sum inniheldur allar niðurstøðurnar, og tvey fylgibind, á tilsamans 722 síður.

Fylgibind eitt ber heitið



Hvítari var hon, um einki stóð í, segði teknarin Óli P., men heldur lesarin, at tað stendur í Hvítubók, sum eigur at standa í henni, ella manglar okkurt?


»Búskapur« við undirheitinum »ein sjálvberandi føroyskur búskapur«. Hetta bindið snýr seg um í høvuðsheitum um at minka um ríkisveitingina og um búskaparpolitiska stýring.

Innihaldið í búskaparbindinum er í tveimum pørtum. Ein um avleiðingarnar av at minka ríkisveitingina bæði yvir stutta og yvir langa tíð, meðan hin parturin snýr seg um búskaparpolitiska stýring og tillaging.

Fylgibind tvey hevur fingið heitið »Fyrisiting« og ber undirheitið »ein sjálvstøðug føroysk fyrisiting«. Hetta bindið er ein lýsing av tí fyristingarliga samstarvinum við Danmark og teimum krøvum, fullveldis-



Hevur Høgni Hoydal allar tær upplýsingar honum tørvar í fullveldisarbeiðinum




Poul Nyrup Rasmussen hevur eisini fingið eitt eintak av Hvítubók, og um ikki so langa tíð skal hann samráðast við føroyingar um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Fer tað aftur tá at vera brúk fyri peikifingrinum ella er samgongan soo væl fyrireika, at tað slepst undan tí?

ætlanin setur.

Fyristitingarliga økið er rættiliga stórt at fara um, og tískil er hetta bindið eisini tað drúgvasta av teimum trimum. Síðutalið er heilar 372, so har er ovmikið at lesa.

Høvuðsbindið er sjálv Hvítabók, sum samstundis er tynsta bindið í »savninum«. 162 síður við samandráttum og niðurstøðum.



Hevur pressan lýst tað sum lýsast skal, ella manglar okkurt?

»Støðið undir einum sáttmála, ið skipar Føroyar sum eitt fullveldisríki í samstarvi við Danmark« stendur at lesa á forsíðuni á Hvítubók.

Hvat siga Palleba og Marsanna

Síðani Hvítabók var almannakunngjørd, hevur verið gjørt rættiliga nógv burtur úr henni. Sum vera mann eru tað politikararnir, sum fyrst eru komnir til orðanna um innihaldið.

Tað eru eisini teir, sum framhaldandi skulu kjakast um ríkisrættarligu viðurskiftini Føroyar og Danmarkar ímillum, so sæð frá tí vinklinum er tað ikki so løgið, at tað eru teir, sum fyrst vera spurdir.

Men hvat sigur tann meinigi føroyingurin um Hvítubók?

Hvat heldur Palleba um tað sum stendur um búskaparviðurskiftini í Hvítubók og hennara fylgibindum. Heldur hann, at alt er komið við í bókina, sum eigur at vera við, ella heldur hann, at okkurt vantar.

Ella heldur Marsanna at politikararnir eiga at sleppa at svara onkrum heilt nágreiniligum spurningi?

So fáa tey bæði og allir aðrir føroyingar møguleikan nú!

Spyr um Hvítubók

Tí í komandi tíðum fer Sosialurin at geva øllum lesarum sínum møguleikan at seta spurningar sum hava beinleiðis tilknýti til Hvítubók og til tosið um fullveldi.

Hesir spurningar skulu sendast til Sosialin, sum síðani fer at fáa politikarar og aðrar serkønar at svara spurningunum eftir besta førimuni.

Tað eru ymsir mátar at senda spurningar til Sosialin.

Ein er at brúka frymilin sum stendur á hesi síðuni, og antin senda við posti ella um telefaks, meðan ein annar er at brúka ta nýggju tøknina og senda um teldupost.

Til tað endamálið er teldupost adressan hvitabok@sosialurin.fo.

Sosialurin heitir tí á fólk, sum sita inni við onkrum, sum tey ynskja svar upp á í sambandi við Hvítubók, um at senda okkum spurningin.

Spurningarnir verða prentaðir í blaðnum so hvørt sum teir vera svaraðir.

Spyr um Hvítu...

Lesarar fáa nú høvi at seta politikarum o.ø. spurningar, ið hava samband við Hvítubók. Spurningar og svar, ið skulu vera stutt og greið, verða endurgivin undir teiginum »Spyr um Hvítu«

Høgni Mohr og Sveinur Tróndarson

Í sambandi við, at útgreiningararbeiðið hjá Føroya Landsstýrið er liðugt og útgivið undir heitinum, Hvítabók, fer Sosialurin undir stórt kunningarátak. Allir føroyingar fáa høvi at seta politikarum og serfrøðingum spurningar, sum hava samband við Hvítubók, og framtíðarstoðu Føroya.

Spurningarnir skulu sendast Sosialinum, sum ber spurningin víðari til rætta viðkomandi.

Til tess at so nógvir spurningar sum gjørligt skulu sleppa framat, halda vit, at ávísar treytir eiga at vera knýttar uppí tiltakið.

Stutt og greitt

Tað hevur stóran týdning, at spurningarnir eru stuttir og greiðir; eins og svarini frá politikarum o.ø. verða. Sera umráðandi er eisini, at spurningarnir verða stílaðir til ávísan persón. Ætlar spyrjarin sær t.d. at seta løgmanni onkran spurning, skal hetta viðmerkjast í tí skrivaða spurninginum. ***Tríggir hættir eru at seta spurningar:***

Bræv: Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Faks: 31 47 20

Teldupostur: hvitabok@sosialurin.fo

Spurningur til Reidar Nónfjall:
Umboð fyri banka og búskaparfrøðingur halda, at ov lítið er gjørt burturúr onkrum parti í búskaparpartinum av Hvítubók. Hví hava tit ikki gjørt meira..?

Spurningur til Høgna Hoydal:
Hví vera lond, sum í fólkatali eru einar 10 - 20 ferðir so stór sum Føroya, samanborin við okkum..?

Spurningur til Høgna Hoydal, ella sálarfrøðing:
Hví er ongin partur í Hvítubók, ið viðgerð hugtakið »samleiki«. Hevur samleikin ikki sera stóran týdning í hesum sambandi ...!

Spurningur til Herluf Sigvalsson:
Hvussu nógv hevur arbeiðið at skriva Hvítubók kostað..?

Spurningur til Sjúrð Skaale:
Hví er onki skil á donsku týðingini av Hvítubók...?

Spurnarlepi

Spurningur til: _____

Spurningur: